Hoyvíkar Skúli

## LÆRARASTØRV Í HOYVÍKAR SKÚLA

**Søkt verður eftir 7 lærarum í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009.**

Størvini eru fyri lærarar í farloyvi, lærarar við lækkaðum tímatali, tímar vegna serligan tørv, avlopstímar, tímar til ráðgeving og í sambandi við eftirútbúgving.

Størvini eru fulla tíð. Tó verður endaliga tímatalið av einum starvi ásett 1. september 2008.

**Skúlin hevur brúk fyri lærarum, sum kunnu undirvísa í:**

- 1.-3. flokki: føroyskum, heimstaðarlæru, støddfrøði, ítrótti og handaverki og list. Harumframt skulu tveir lærarar átaka sær flokslærarauppgávu.
- 4.-7. flokki: kristni, føroyskum, donskum, enskum, støddfrøði, náttúru og tøkni, smíð og ítrótti. Lærarar skulu átaka sær flokslærarauppgávu.
- Skúlanum tørvar lærara til serstovu til næmingar við serligum tørvi.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**

- Hava læraraútbúgving
- Eru sinnaðir at samstarva í árgangstoymum
- Ynskja gott samstarv við heimini
- Vilja vera við at framhaldandi menna skúlan

Størvini eru lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 29.2
Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlastjóran, Birgit Arge á telefon 302590 ella 227603.

Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi seinast mánadagin 23. juni klokkan 12.

Í Hoyvíkar Skúla verða komandi skúlaár umleið 390 næmingar í 18 flokkum frá 1.-7. flokk. Her fara at starvast 36 lærarar og 3 stuðlar.

**Hoyvíkar Skúli**
Vegurin Langi · Postsmoga 3073 · 110 Tórshavn

## Bilur til Sølu

Nissan Almera 2,2 Diesel
frá januar 2002
koyrt 250.000 km.



**Ring 284444**

## Skúlin á Fossánesi

**Størv í Skúlanum á Fossánesi skúlaárið 2008/09**

- Tvey lærarastørv fyri lærarar í barnsburðarfarloyvi. Størvini eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2008/09
- Tvey føst lærarastørv fulla tíð.

**Tann ið settur verður skal:**

- Undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- Duga at samstarva og vera fyrikomandi
- Vera fús/ur at taka á seg tær uppgávur, ið eru á skúlanum
- Vera stundislig/ur og nærløgd/lagdur

**Førleikakrøv:**
Tann, sum settur verður í starv, skal hava læraraútbúgving .

**Løn :**
Lønt verður sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 29.2

Umsóknir við c.v., og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi mikudagin 25. juni klokkan 12:00

Fleiri upplýsningar um starvið fært tú við at venda tær til Poul Jacob Zachariassen, skúlaleiðara á tlf. 452120 ella 585894.

**SKÚLIN Á FOSSÁNESI**
730 Norðdepil · tlf. 452120 · fax 452122
T-postur: fos@skulin.fo · www.skulin.fo/fos

**Skúlin á Fossánesi** hevur komandi skúlaár 53 næmingar, sum ganga í 1.til 7.flokk. Skúlin er væl útgjørdur við bókum og amboðum. Samvirkna talvan er í hvørjum flokshøli og fartelda til hvønn lærara.Sí annars heimasíðuna.

Hoyvíkar Skúli

## STUÐULSFÓLK TIL HOYVÍKAR SKÚLA

**Søkt verður eftir 3 stuðulsfólkum til skúlaárið 2008/2009 til næmingar við serligum tørvi í 1., 2. og 4. flokki.**

Stuðlarnir arbeiða saman við lærarunum í flokkinum.

Fyrimun hava umsøkjarar við viðkomandi útbúgving og royndum.

Løn sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlastjóran, Birgit Arge á telefon 302590 ella 227603.

Umsóknir við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi seinast mánadagin 23. juni klokkan 12.

**Hoyvíkar Skúli**
Vegurin Langi · Postsmoga 3073 · 110 Tórshavn

SUNDA KOMMUNA

## Lærarastørv í Hósvíkar skúla

**Hesi størv verða lýst leys at seta frá 1. august 2008:**

- 2 lærarar í fast starv frá 1. august 2008.
- 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009 vegna avlopstímar og lækkað tímatal. Starvið er uml. 11 tímar um vikuna. Endaliga tímatalið verður ásett 1. september.

**Tey, ið sett verða skulu:**

- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og vera fyrikomandi
- verða fús at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Tey, ið sett verða, skulu hava læraraútbúgving

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 29.2

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvi, c.v. og møguligum viðmælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 20. juni kl. 12.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Eydnu M. Midjord, skúlaleiða, á tlf. 422259 ella 772024.

**Hósvíkar skúli**
Vørðuvegur 5 · 420 Hósvík

**Hósvíkar skúli** er ein 3 flokkaður skúli við undirvísing í 1.- 7. árgang. Komandi skúlaár verða 5 lærarar og uml. 42 næmingar í skúlanum.

## Hús á Toftum til sølu

Um hóskandi boð fæst verður ognin Regnavegur 45, matr. nr. 368c, Tofta bygd seld. Talan er um eini minni hús á umleið 35 fermetrar í einari hædd við krúpikjallara og tilbygningi uppá 10 fermetrar.

Innrætting: Køkur/stova saman, gangur, baðirúm og kamar. Miðstøðuhiti er í húsinum. Húsini eru bygd sum eini sethús, men mest nýtt sum summarhús. Alt innan í húsinum fylgir við keypinum. Húsini eru í góðum standi, urtagarður er eisini. Grundøkið er 453 fermetrar.

**Nærri upplýsingar fáast á telefon 374 512 og fartelefon 22 18 92.**
**Teldupost: nordberg@post.olivant.fo**